# VIKUSKIFTI

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# List í skúlagarðinum







**Skúlagarðurin skal geva næmingunum listarligan íblástur, og tí hevur Norðskála-Oyrar skúli fingið eina skurðmynd inn á skúlaplássið**

LIST

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Skúlagarðurin uttan fyri Norðskála-Oyrar Skúla er fullur av lívi og virksemi. Á heimasíðuni hjá skúlanum stendur at lesa, at skúlagarðurin er lykilin til eitt skúlalív við rørslu og spæli.

Nógv er gjørt fyri at fáa ein so góðan skúlagarð sum gjørligt, og børnini eru veruliga glað fyri hann. Tey spæla har tíðliga sum seint, og tað hava tey alla orsøk til.

Við klatriveggi, reiggjum, graslíkisvølli og øðrum við flýgur tíðin avstað.

Men tað er ikki bara spæl í garðinum. Á heimasíðu skúlans stendur, at skúlagarðurin eisini skal geva børnunum listarligan íblástur, og tí stendur nú ein skurðmynd úr rekaviði og prýðir skúlagarðin.

- Skúlaplássið verður so nógv brúkt, at eg fái ikki roknað tað í tímum. Tí er tað týdningarmikið, hvat tað er, sum er í garðinum, og tí hava vit so fingið hesa skurðmyndina inn í garðin, sigur Óla Jákup Joensen, leiðari við Norðskála-Oyrar Skúla.

Skurðmyndina hevur Tønnes Mikkelsen gjørt, sum starvast á skúlanum og ætlanin er, at børnini kunnu fylgja arbeiðinum hjá Tønnes við skurðmyndini.

Norðskála-Oyrar Skúli ger annars nógv við list í skúladegnum. Allir næmingarnir hava ein tíma tónleik um vikuna, og aftrat tí hava tey so lærugreinina handaverk og list. Í fyrsta flokki hava tey tað ein tíma um vikuna, í øðrum flokki tveir tímar og frá triðja til sjeynda flokk hava tey fýra tímar handaverk og list um vikuna.

Hetta eru tey ógvuliga glað um á skúlanum, tí soleiðis vera teir bókliga veiku næmingarnir ikki við sviðusoð.

Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður:

# Hitin setti met í september mánað



Í morgin, leygardagin, verður lítil vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar. Sunnudagin veksur hann vindin av landsynningi, seinnapartin upp í hvassan vind. Sum frá líðir fer at regna, og tað verður mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig. Mánadagin verður eisini upp í hvassan vind av útsynningi og ælaveður, men tó onkur sólglotti. Hitin verður millum 7 og 10 stig. Týsdagin og mikudagin sær út til at blíva frægari veður. Mest sunnan í ættina og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.

Vit kunnu leggja afturat, at hitin setti met í september mánað í ár. Miðalhitin bleiv 11,6 stig, og tað er tað heitasta, ið nakrantíð hevur verið mált í september mánað, í øllum førum síðani 1875. Í 1939 og 1941 var miðalhitin 11,3 stig, og hetta er tað mesta, sum er mált áður.